Finnur Helmsdal tikið seg aftur sum valevni

# Valstríðið hevur týdning heldur enn valið

**Finnur Helmsdal avgjørdi í seinastu viku at taka seg av valevnislista Tjóðveldisfloksins. Hann heldur ikki, at tað er neyðugt hjá honum at stilla upp til valið, tá ið listin longu er somikið stórur. Samstundis heldur hann lítið um at sita á fólkatingi**

FÓLKATINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Valevnislistin hjá Tjóðveldisflokkinum varð upprunaliga gjørdur á eykaflokstinginum hjá flokkinum, men síðani tá eru nakrar broytingar gjørdar á listanum, soleiðis at endaligi listin nú telur tjúgu valevni.

Ein av teimum, ið var á upprunaliga listanum yvir valevni, er Finnur Helmsdal, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin. Hóast hann játtaði at stilla upp til valið upprunaliga, hevur hann tó broytt støðu. Tað var hósdagin í seinastu viku, at Finnur Helmsdal boðaði flokki sínum frá, at hann ikki ynskir at stilla upp fyri flokkin til fólkatingsvalið hin 20. november.

Finnur Helmsdal er varamaður á tingi fyri Høgni Hoydal, landsstýrismann, og hann hevur eisini roynt seg bæði til løgtings-, býráðs- og fólkatingsval. Persónliga atkvøðutalið hevur eisini ligið omanfyri hundrað við okkurt høvi.

Orsøkirnar til, at hann ikki velur at stilla upp hesaferð, sigur hann vera, at hann ongantíð hevur verið serliga áhugaður fyri at stilla upp til fólkatingsval, hóast hann hevur roynt hetta.

– Av fyrstan tíð játtaði eg at stilla upp, men tá eg sá, at listin var rættiliga stórur og góður, so helt nóg góða orsøk vera fyri ikki at stilla upp, sigur Finnur Helmsdal.

Finnur Helmsdal heldur, at tað hevur týdning, at Tjóðveldisflokkurin er við í valstríðnum, soleiðis at hinir flokkarnir ikki fáa alla umtaluna hesa næstu tíðina.

– Eg haldi tað vera týdningarmikið, at Tjóðveldisflokkurin er við í valstríðnum, tá ið hinir flokkarnir eru við. Spyrt tú meg, um tað er rætt at stilla upp, so vil heldur siga nei enn ja. Tað er valstríðið, sum hevur týdning, heldur enn valið, sigur Finnur Helmsdal.

Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum heldur, at flokkur hansara hevur góðan møguleika at vinna sær sess á fólkatingi, tá ið flokkurin stendur sterkari í huganum hjá veljarunum nú enn seinastu ferð.

Hann visir eisini á, at tað er óheppið, nú samgonguflokkarnir liggja og kríggjast innanhýsis upp undir valið. Finnur Helmsdal sær helst, at tað vera tvey umboð úr núverandi samgongu, ið fáa umboðan á fólkatingi 20. november.

Høgni Hoydal, formaður fyri Tjóðveldisflokkin, sigur seg virða avgerðina hjá Finni Helmsdal. Floksformaðurin heldur tað samstundis vera keðiligt, at Finnur Helmsdal ikki stillar upp, tá ið hann hevði kunnað savnað saman atkvøður.

Finnur Helmsdal ætlar ístaðin fyri fólkatingsvalið at leggja alla orku í komandi løgtingsval.



*Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, hevur ongantíð hildið nógv um føroysku fólkatingssessirnar, og hann hevur eisini valt at taka seg av listanum hjá Tjóðveldisflokkinum. Hann heldur tó, at tað hevur týdning at luttaka í valstríðnum*

## Eldri kvinna fekk hvítt pulvur

BRÆV
*Stefan í Skorini*

Tá postboðið í Klaksvík hevði verið runt í húsunum mánamorgunin, fekk ein eldri kvinna ein rættiligan hvøkk.

Tá hon lat eitt bræv upp, datt hvítt pulvur úr brævbjálvanum. Hon boðsendi løgregluni beinanvegin, og hon hevur verið á staðnum og kannað málið.

Hetta verður tó ikki hildið at vera nakað álvarsamt. Kvinnan er ikki kannað á sjúkrahúsinum, men hon hevur fingið at vita, hvørji sjúkueyðkennini eru, um tað skuldi víst seg, at talan er um miltbrand.

Tað vil siga, at løgreglan heldur ikki, at hetta hevur nakað upp á seg.

Brævið er sent úr Danmark. Tað er tó óvist, hvør hevur sent brævið, og hvør hevur lagt pulvur í brævbjálvan.

# ILA illgrunin staðfestur í Hvannasundi



**ILA er staðfest í einum aliringi hjá Faroe Salmon í Hvannasundi. Týsdagin var úrslitið av royndunum greitt, og tað vísti, at orsøkin til stóra felli í ringinum var ILA**

ILA
*Stefan í Skorini*

Tað var í seinastu viku, at alararnir fingu illgruna um, at okkurt var galið, tí fellið í ringinum var stórt. Teir boðsendu tí djóralækna, sum tók nakrar royndir, og tær vórðu sendar til Noregs til nærri kanningar.

Í síðstu viku ávaraðu landsdjóralæknin og Hans Jacobsen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag, í Sosialinum um, at ILA fór at breiða seg um alt landið, og hetta gongur nú sjón fyri søgn.

ILA varð fyrstu ferð staðfest á Fuglafirði í apríl 2000. Síðani stóð alibrúkið á Oyndarfirði fyri skotum, og smittan breiddi seg eisini til Funningsfjørð. ILA varð síðani staðfest á Lambavík. Seinastu tvær vikurnar er ILA-virusið funnið í Nólsoyarfirði og í Hvannasundi.

Alarar vilja sleppa at koppseta fiskin beinanvegin, men hesum loyvir ES ikki enn. Landsdjóralæknin væntar harumframt, at vøksturin í alivinnuni ikki verður eins stórur, sum serfrøðingar hava væntað.





*Høgni Hoydal metir, at hann kann vera bæði landsstýris- og fólkatingsmðaur nakrar mánaðir. Men Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur kortanei*

# Ætlar sær báðar sessirnar

**Verður Høgni Hoydal valdur á Fólkating, ætlar hann at røkja bæði landstýris- og fólkatingssessin, um arbeiðsbyrðan í landsstýrinum loyvir tí. Tað kemur als ikki upp á tal, at hann sleppur tað, sigur løgmaður**

FÓLKATINGSVAL
*Edvard Joensen*

Hóast Høgni Hoydal, landsstýrismaður, heldur, at hann kann røkja bæði landstýris- og fólkatingssessin, um arbeiðsbyrðan í landsstýrinum loyvir tí, sleppur hann ikki fyri løgmanni. Løgmaður sigur kortanei.

Seinasta veljarakanningin, sum gjørd er upp undir fólkatingsvalið, gevur Tjóðveldisflokkinum annan føroyska fólkatingsmannin. Sannlíkt er, at tann, sum valdur verður, fer at eita Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal sigur í viðmerking til kanningina, at hon skal takast við fyrivarni, tí tann parturin, sum onga endaliga avgerð hevði tikið, var rættiliga stórur og kann lættliga broyta alt valúrslitið.

Men hinvegin ætlar hann sær, um hann verður valdur á Fólkating, at møta og í øllum førum halda eina setanarrøðu.

Tað er heldur einki óvanligt í tí, at ein landsstýrismaður ella ein løgmaður verður valdur á Fólkating. Teir eru eisini møttir og hava síðan latið sessin frá sær aftur til næstvalda umboðið á listanum.

Atli Dam hevur verið valdur fólkatingslimur, meðan hann var í Tinganesi, eins og Edmund Joensen við næstseinasta fólkatingsval varð valdur, meðan hann var løgmaður í Føroyum. Báðir møttu á Fólkatingi, men lótu síðan sessirnar til varamenninar.

Høgni Hoydal hevur sama møguleikan, men hevur ikki enn gjørt av, hvat hann fer at gera, um støðan verður aktuell.

Hann vil ikki gera viðmerkingar til, um persónsspurningar kunnu fara at spæla inn. Spurdur um ávísir navnnevndir tjóðveldismenn kunnu gerast ein trupulleiki, um teir koma á Fólkating sum eykamenn fyri Høgna Hoydal, svarar hann bert, at teir munnu vera líka frægir sum onkur annar.

Men Høgni Hoydal váttar tó fyri Sosialinum, at hann kanska kann fara at røkja bæði størvini, um arbeiðsbyrðan í Tinganesi loyvir tí. Tí tað er so stutt eftir av løgtingsvalskeiðnum, og eingin er sum sigur, at hann framvegis er landsstýrismaður, tá mai mánaði kemur.

Ein slík støða hevði verið rættiliga óvanlig, men avgjørt ikki ólóglig, verður sagt av løgmansskrivstovuni í Tinganesi.

Løgfrøðingarnir á Løgmansskrivstovuni siga, at tað er eingin løgfrøðilig forðing fyri, at ein landsstýrismaður kann røkja báðar sessirnar.

Men tað gongur løgmaður ikki við til.

– Tað kemur als ikki upp á tal, at ein landsstýrismaður fær loyvi til tað, sigur Anfinn Kallsbnerg, løgmaður, púra avgjørdur.

Hóast eingin lóg forðar tí, er tað løgmaður, sum hevur seinasta orðið at siga í slíkum máli, vísir hann á. Løgmaður setir landsstýrismenn og kann eisini loysa teir úr starvi. Og hendir tað, at ein landsstýrismaður kemur í ta støðuna, sum oman fyri er nevnd, verður hann í stundini loystur úr starvinum sum landstýrismaður, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Í oddagrein og øðrum greinum í Dagblaðnum hesa vikuna, rekur Óli Breckmann, blaðstjóri og fólkatingslimur, fram undir, at hendan støðan verður aktuell, og ger sær sínar metingar um, hvat so fer at henda.

Høgni Hoydal vil als ikki gera viðmerkingar til ta skrivingina, sigur hann. Hon er á so lágum støði, at har niður fer hann ikki.

– Eg fari heldur burtur úr politikki, enn at flyta meg niður á støðið hjá Óla Breckmann, sigur hann.

